

## Aldur toskur kann smitta

Fiskimenn við Tróndheimsfjørðin í Noregi bera ótta fyri, at aldur toskur skal smitta tann villa toskin á fjørðinum við ymsum sjúkum. Fiskimenninir vísa á, at tað finnast tey dømi um sjúkan tosk. Í báðum førum var talan um fisk, sum var reyðflekkutur, og sum hevði sár og svullar undir búkinum, skrivar blaðið Trønder-Avisa. Teir báðir sjúku toskarnir eru sendir myndugleikunum til kanningar, og nú bíða bæði fiskimenn og alarar eftir svarinum, sum væntandi kemut mitt í vikuni, skrivar blaðið.

# Loystu trupulleika hjá landinum




*Røktarheimið á Mørkini við Streymnes er fyri tað mesta goldið við kommunalum peningi hjá Sunda kommunu. Orsøkin til, at kommunurnar, sum nú eru í Sunda kommunu, avgjørdu at byggja heimið er, at tey kendu seg noydd at loysa trupulleikan, hóast tað í veruleikanum er ein landsuppgáva*

*Mynd: Eirikur í Jákupsstovu*

**Heðin Zachariassen, løgtingsmaður og fyrrverandi borgarstjóri í Sunda kommunu, greiðir frá, at hóast Tórshavnar kommuna hevur púra rætt, at tað er landið, sum eigur eldraøkið, so má mann onkuntíð gera tað, ið krevst. Tað var hetta bygdirnar í núverandi Sunda kommunu gjørdu, tá tær settu røktarheimi á Mørkini í gongd**

ELDRAØKI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hóast tað í lógini er púra greitt, at landið eigur eldraøkið, og kommunur bara kunnu byggja røktarheim, sum síðani skulu góðtakast av landinum, so heldur Heðin Zachariassen ikki, at nakað skeivt varð gjørt, tá kommunurnar, ið nú manna Sunda kommunu, avgjørdu at byggja eitt røktarheim fyri 38 milliónir krónur, sum kommunurnar sjálvar guldu 22 milliónir krónur av.

Umleið tað sama hevur verið galdandi, tá talan er um ymisku búplássini til eldri, sum eru komin kring landið seinastu árini. Kommunurnar hava goldið bróðurpartin, hóast ongin lógarfest ábyrgd er hjá kommunum.

- Tað var javnan at fólk kærdu sína neyð, tí tey eldru ikki kundu vera verandi í sínum umhvørvi. Tí valdu vit at loysa trupulleikan, hóast tað í veruleikanum ikki var okkara borð, sigur Heðin Zachariassen, ið var borgarstjóri í Sunda kommunu, tá røktarheimi varð tikið í nýtslu. Hann leggur afturat, at kommunan hevði skyldað einar 20 milliónir krónur minni, um hon valdu at lata vera við at byggja, men av tí at landið onki vildi gera, so kendu kommunurnar í økinum eina skyldu at loysa bráðfeingis trupulleikan sum var.

### Skilir væl Havnina

Heðin Zachariassen skilir væl, at Tórshavnar kommuna peikar á landið, tá talan er um hesa uppgávuna.

- Tað er púra greitt, at landið eigur at útbyggja eldraøkið, so eg skilji væl, hvat Heðin Mortensen meinar við. Hinvegin burdi Tórshavnar kommuna sæð tørvin í kommununi, og tí kundi kommunan kanska raðfest øðrvísi, á sama hátt sum vit gjørdu á sinni, sigur Heðin Zachariassen.

### Onki heim uttan hjálp

Tá røktarheimið á Mørkini á Streymnesi varð gjørt, tóku kommunurnar bróðurpartin av kostnaðinum, men landið bar eisini sín part av kostnaðinum.

- Landið lovaði okkum 500.000 krónur fyri hvørt fólkið, ið skuldi búgva á røktarheiminum. Tí fingu vit 16 milliónir krónur, umframt, at landið hevur allan raksturin um hendi. Tí er tað eisini landinum at takka, at vit hava eitt røktarheim, sigur Heðin Zachariassen.

### Kommunurnar betri føling

- Vit síggja, at tá kommunurnar eru við í einum arbeiði, so koma loysnirnar eisini. Tí haldi eg, at mann í kommunureforminum, sum er á veg, skal geva kommunum eldraøkið eisini, sigur Heðin Zachariassen. Hann leggur afturat, at kommunurnar síggja trupulleikarnar betri enn landið, og tí eru tær betri førar fyri at skilja støðuna.

# Landið má raðfesta heimarøktina

**Í gjár lat eldraráðið í Tórshavnar kommunu býráðnum eitt skriv, har eldraráðið biður kommununa taka upp samráðingar við Landsstýrið um akuttu støðuna á eldraøkinum í høvuðsstaðnum.**
**– Eg taki ein fund við Rósu Samuelsen sum skjótast, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn**

ELDRAØKI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Sambært Heðini Mortensen er støðan hjá teimum gomlu í høvuðstaðnum ikki nóg góð, men tað er ikki nakað kommunan skal lastast fyri.

- Eg standi fast við alt tað sama, sum eg segði í gjár, at tað er landið, ið hevur ábyrgdina av eldraøkinum, vísir Heðin Mortensen á. Tó fer hann heilt skjótt á fund við Rósu Samuelsen um støðuna.

- Kommunan hevur verið í samskifti við almannamálaráðið, og Rósa Samuelsen fær eina uppringing frá mær aftur í dag. Vit mugu set okkum saman at finna alternativar loysnir, og har má heimarøktin koma allarfyrst, tí hon kann loysa akuttar trupulleikar, sigur Heðin Mortensen.

### Droppa gølubygning

Heðin Mortensen er sannførdur um, at tað mugu alternativar loysnir til nú trupulleikin er blivin so stórur. Hinvegin dámar honum framvegis onki alternativu loysnina at keypa bygningarnar undir Gráasteini.

- Tað tekur tíð at byggja búpláss, og vit vita á ongan hátt, um hasir bygningarnir undir Gráasteini nakrantíð verða góðtiknir, sigur Heðin Mortensen.

### Hava pening til alt annað

- Nú havi eg eisini eina áheitan frá eldraráðnum í hondini, og tí stendur støðan hjá okkum sterkari, sigur Heðin Mortensen. Hann leggur afturat, at hann heldur tað vera undarligt, at landið hevur ráð til at byggja tunlar og so framvegis, tá teir ikki vilja prioritera eldraøkið.

Spurdur hví Tórshavnar kommuna ikki hevur gjørt nakað sjálv, tá aðrar kommunur í landinum hava gjørt so nógv burturúr eldraøkinum heldur Heðin Mortensen fast við, at hetta ikki er ein uppgáva, sum kommunurnar juridiskt sæð onga ábyrgd hevur av.

- Tað vísir seg sum, at landið vil hava allan avgerðarrættin, meðan kommunurnar skulu bera allan kostnaðin, sigur borgarstjórin í Havn.